UTTAN ÚR HEIMI

# Neyvan al-Qaeda

**Egyptiskir eygleiðarar halda ikki, at tað var al-Qaeda, sum sprongdi bumburnar í Sharm el-Sheikh leygarnáttina.**

Yvirgangur
Árni Joensen:
fartekst@mail.dk

Síðani leygarnáttina hava væl mannað egyptisk løgreglulið leitað eftir monnunum, sum skipaðu fyri teirri blóðugu atsóknini at frítíðarstaðnum Sharm el-Sheilk, har minst 86 fólk lótu lív.

Í gjár kunngjørdi løgreglan, at hon leitaði eftir fimm pakistonskum ríkisborgarum, sum vóru í Egyptalandi, men sum eingin hevur borið eyga við síðani atsóknina. Frammanundan hevur løgreglan sagt, at atsóknin var sera væl fyrireikað. Eitt nú høvdu bumbumenninir tikið øll eyðkenni av motorunum í bilunum, sum teir brúktu til atsóknina, og tí veit løgreglan ikki, hvør átti bilarnar.

Egyptisku myndugleikarnir kunngjørdu um vikuskiftið, at ein felagsskapur, sum hevur tilknýti til al-Qaeda, hevði átikið sær ábyrgdina av atsóknini at Sharm el-Sheikh, sum er eitt sera væl umtókt frítíðarstað hjá útlendingum.

Men egyptiskir eygleiðarar ivast í, at hetta er so. Teir halda, at tað mundu heldur vera egyptiskir mótmælismenn, sum sprongdu bumburnar, og at endamálið við atsókini er at órógva stýrið hjá Hosni Mubarak, forseta. Forsetaval verður í Egyptalandi í næstum, og fyri fyrstu ferð sleppa fleiri valevni at stilla upp. Kortini hava myndugleikarnir strikað fleiri valevni, og tað hevur elvt til misnøgd, skrivar Reuters. Egyptisku eygleiðarar siga, at tað er ikki óhugsandi, at tað vóru víðgongdar andstøðukreftir, sum sprongdu bumburnar í Sharm el-Sheikh,.

Nógvir hundrað norðurlendingar hildu frí í Sharm el-Sheikh, tá bumburnar brustu, og nakrir teirra fingu skaða. Tey flestu, sum doyðu, vóru egyptar, men atsóknin kostaði eisini ferðafólkum úr Turkalandi, Bretlandi, Italia, Kekkia, Russlandi, Niðurlondum, Ísrael og Ukraina lívið, skrivar Reuters.



*Egyptiskir eygleiðarar halda ikki, at tað var al-Qaeda, sum skipaði fyri atsóknini í Sharm al-Sheikh.*

# Fimm bumbumenn ganga leysir í London

**Bretska løgreglan leitar eftir fimm monnum, sum verða settir í samband við bumburnar í London.**

YVIRGANGUR
Árni Joensen:
fartekst@mail.dk

Løgreglan í London hevur gjørt av at senda uppaftur fleiri løgreglumenn at leita eftir teimum fýra monnunum, sum royndu at spreingja fýra bumbur í býnum seinasta hósdag.

Um vikuskiftið varð ein ryggsekkur við einari bumbu funnin í einari lund við Wormwood Scrubs har vesturi í London, men løgreglan veit ikki, at hendan bumban hevur samband við teir somu fýra menninar, ella um talan er um ein fimta bumbumann. Men sambært blaðnum The Times heldur løgreglan, at fimm bumbumenn ganga leysir í býnum.

Keldur innan løgregluna hava sagt, at bumbumenninir eru helst av eysturafrikonskum uppruna, og at løgreglan hevur fingið vissu fyri, at teir høvdu samband við teir fýra sjálvmorðsbumbumenninar, sum sprongdu bumburnar tann 7. juli. Tann atsóknin kravdi 56 mannalív.

Sambært The Times heldur løgreglan eisini, at ein maður hevur lagt allar bumbuatsóknirnar til rættis, og hann gongur eisini leysur enn.

## Tinglimirnir møttu ikki

Nú um dagarnar skipaði leiðslan í bretska parlamentinum fyri einari yvirgangsvenjing í Undirhúsinum, mrn áhugin ímillum tinglimirnar vísti seg ikki at vera serliga stórur. Bara 30 tinglimir ella minni enn fimm prosent av tingmanningini tóku lut í venjingini, skrivar tíðindastovan AFP.

Geoff Hoon, sum er formaður í Undirhúsinum, sigur, at hann er sera vónsvikin av luttøkuni. Bob Russel, sum var tann einasti av tingmanningini hjá Liberaldemokratunum, sum var við í venjingini, heldur, at teir bretsku politikararnir áttu at víst størri áhuga fyri venjingini, tá hugsað verður um tað, sum er hent í London í seinastuni.

-Vilja politikararnir hava teir vanligu borgararnar at geva trygdini størri áhuga, áttu teir at gingið undan sum góðar fyrimyndir, sigur Bob Russel við AFP.

## Dýrt heilsuverk

Ein nýggj frágreiðing vísir, at einki land í heiminum brúkar lutfalsliga so nógvar pengar til heilsuverkið sum USA. Í 2002 rindaði hvør einasti amerikanari góðar 32.000 krónur til heilsuverkið, og tað var nógv meiri, enn fólk í øðrum framkomnum londum gjørdu. Harafturat kann nevnast, at í 2002 fóru 14,6 prosent av amerikonsku bruttotjóðarframleiðsluni til heilsumál. Í Danmark var tað tilsvarandi talið 8,8 prosent.

Amerikanskir granskarar, sum hava kannað viðurskiftini, siga í einari frágreiðing, at tað er í lagi, at amerikanarar rinda meiri fyri heilsumál, enn onnur gera, men trupulleikin er, at teir fáa ikki meiri fyri pengarnar kortini. Tvørturímóti vísir tað seg, at USA hevur lutfalsliga færri sjúkrahússengur, færri læknar og færri sjúkrasystrar enn onnur framkomin samfeløg.

Granskararnir skriva í frágreiðingini, at amerikanska heilsuverkið byggir í stóran mun á marknaðarpolitisk viðurskifti, har tryggingarfeløgini hava nógv at siga. Teir siga, at hendan skipanin hevur nógvar útreiðslur við sær, og at hon krevur eisini munandi størri umsiting enn tær skipanir, sum onnur lond hava.

-Tað er í lagi, at fólk gjalda meiri, um tey fáa tilsvarandi meiri fyri pengarnar, men tey fáa tað sama sum onnur, sigur professarin Gerard Andersson við tíðarritið Health Affairs.

## Flogvanlukka var sjálvmorð

Týska løgreglan sigur, at tann einsamalli maðurin, sum datt niður í einum flogfari tætt við tinghúsið í Berlin seinasta fríggjakvøld, gjørdi tað við vilja.

Løgreglan sigur, at kona tann 39 ára gamla flogskiparan hvarv seinasta hósdag. Fríggjamorgunin var maðurin til avhoyringar hjá løgregluni, men varð latin leysur aftaná. Seinni um dagin fór hann út á ein lítlan flogvøll, og nakað seinni datt flogfar hansara niður tætt við ríkisdagsbygningin. Frammanundan hevði hann givið einum 14 ára gomlum soni lyklarnar til húsini og ymsar aðrar lutir.

Løgreglan í Berlin hevur framvegis ikki funnið ta horvnu konuna, men gitt verður, at maðurin hevur beint fyri henni, og at hann síðani tók lívið av sær við at lata flogfar sítt detta niður.

## Samanbrestir í Nepal

Sunnudagin vóru harðir samanbrestir ímillum løgregluna og mótmælisfólk í nepalska høvuðsstaðnum Katmandu.

Mótmælisfólkini kravdu, at fyrrverandi forsætisráðharrin Sher Bahadur Deuba skal latast leysur úr fongslinum. Hann og fleiri hundrað aðrir politikarar vórðu tiknir og settir í fongsul, tá Gyanendra kongur koyrdi tjóðartingið og stjórnina til hús í vár. Síðani hevur kongur stýrt landinum einsamallur við hjálp frá herinum og løgregluni.

Óheftar keldur siga, at minst 25 mótmælisfólk vórðu tikin sunnudagin, og at umleið 15 mótmælisfólk og tíggju løgreglumenn fingu skaða í bardøgunum.